# Eg kenni bara fittar føroyingar

**Julie Maria gleðir seg nógv til at sleppa til Føroyar, tí bæði Eivør og Teitur er so fanstastika deilig menniskju, og hon fegin vil hittta fleiri fittar føroyingar**

FO/DK KONSERTFERÐ
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Julie Maria er ein av nýggjaru stjørnum á danska tónleikahimmlinum, hon hevur drúgvar royndir úr sangkórum og jassumhvørvinum, men er nýliga farin at ganga egnar leiðir, sum eitt slag av singer/songwriter. Á fyrstu fløguni hjá Jule Maria »Beautiful Minor« stóu kend nøvn næstan í bíðirøð at luttaka, og úrslitið er eitt sera stórsligið verk.

Bólkurin hjá henni er ein flokkur av tónleikarum úr jassumhvørvinum, so hóast tónleikurin er sveimandi poppur, so eru improvisatiónir og leitandi spæl ein partur av framførslunum. Í mun til nógvan Singer/-Songwriter tónleik hava løgini tí ikki ein heilt fastan form, men broyta seg á konsertunum.

## Hevur slept blásarunum

Á fløguni spæla blásarar ein stóran leiklut í at skapa ljóðmyndirnar, men hesir eru ikki longur við á konsertunum. Julie Maria sigur, at hetta er ein roynd at finna eina kjarnu í tónleikinum: »Tað hevur verið stuttligt at arbeiða við stórum kórum og blásarum, men tað gerst eisini eitt sindur nógv av tí góða sum frálíður. Nú eru tey bert fimm í bólkinum. Hetta at arbeiða við einum grundbólki, hevur givið pláss til at menna løgini, og tey eru ment á ein eitt sindur rokkkendan hátt.

## Kennir Teit og Eivør

Eins og Teitur hevur Julie Maria avtalu við Universal. Men í hennara føri er bert talan um danska marknaðin, og somuleiðis bert talan um eina útbreiðsluavtalu. Men hon vónar, at hetta kann gerast til meira, og ætlanirnar eru um at sleppa út um donsku landoddarnar.

Konsertferðin til Føroyar er tó ikki ein roynd at fáa fótafestið uttanlanda.

Julie Maria søkti um luttøku, tí at hon helt verkætlanina vera spennandi, og so kendi hon tveir føroyingar, sum vóru so óvanliga deilig menniskju, at hon vildi hitta fleiri. Teit kendi hon gjøgnum fyrrverandi sjeikin hjá sær, ið var úr Holstebro, har Teitur gekk á tónleikaeftirskúla. Eivør hevur hon spælt konsertir saman við á Borhnholm í sambandi við Bornholm Festuge fyrr í ár.

## Væl ílatin

Heldur eingin av tónleikarunum í bólkinum hevur verið í Føroyum fyrr: »So hetta er eitt óskrivað blað fyri okkum, og eg gleði meg nakað so forferdiliga illa« sigur hon, og vil vita hvussu veðrið er í Føroyum, um hvat fyri klæðir hon skal pakka, og um hon skal taka vetrarjakkan við. Tá vit eru komin ásamt um, at heitar troyggir, vetrarjakki, turriklæði og húgva eiga at verða við í taskuni, kunnu vit halda fram við samrøðuni.

## Elskar at spæla á smáum pallum

Julie Maria er eitt nógv virt og lovandi navn á danska pallinum, og tí spælir hon nógvar konsertir. Men tær flestu eru í smærri spælistøðum. Eitt nú er Copenhagen Jazzhouse eitt slag av heimavølli. Hon sigur seg trívast væl á tílíkum smærri støðum, har hon kann hyggja áskoðaran í eygini. »Tónleikurin er eitt samskiftið, og tað er lættari at samskifta í eygnahædd«. Hon er sera forvitin og fregnast um, hvat hetta eru fyri støð, hon skal spæla í Føroyum. Hon er glað at hoyra, at talan er um smærri konserthøli. »Eg havi satt at siga ikki so nógvar royndir á stórum pallum, so eg kenni meg betur í tættari karmum«, sigur hon, og skundar sær upp á loftið at finna vetrarjakkan.



Íløgustjóri til Sp/f 14

**Eitt gott eyga fyri íløgum**

Sært tú nýggjar møguleikar? Tevjar tú, hvat kastar av sær? Og vilt tú royna kreftir á altjóða marknaðum? So er eitt spennandi starv sum íløgustjóri leyst at søkja.

Sp/f 14 seldi skipasmiðjuvirksemið úr felagnum í fjør, og síðan eru ymsar broytingar gjørdar innanhýsis. Nú eru vit til reiðar at fara til verka sum íløgufelag.

Sum íløgustjóri verður tú við til at menna eina gamla fyritøku við nýggjum avbjóðingum. Talan er um eitt spennandi starv við góðum møguleikum fyri fakligari menning. Felagið hevur heimstað í Føroyum, men vit virka í einum magnandi altjóða umhvørvi. Ætlanin er, at vit verða 3 til 5 fólk, sum røkja virði felagsins á skynsamasta hátt.

**Starvið**
Starvið sum íløgustjóri fevnir um at fylgja við íløgum felagsins innan- og uttanlands. Tú skalt hava eitt gløgt eyga fyri nýggjum íløgumøguleikum, og tín uppgáva verður at greina og leggja íløgumøguleikar fyri nevndina. Vit samstarva við fleiri uttanhýsis íløguráðgevar, bæði í Føroyum og uttanlands, og tú samskiftir javnan við teir.

**Førleikar**
Vit rokna við, at tú hevur hægri útbúgving og royndir. Góður kunnleiki til íløguvirksemi er ein treyt, og vit leggja dent á tíni evni at síggja, hvar møguleikarnir liggja. Tú hevur dirvið, torir at taka avgerðir og samskiftir raðið á enskum.

**Treytir og umsókn**
Vit bjóða tær ein virkispall á altjóða stigi og áseta setanartreytirnar í felag. Hevur tú okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi, ert tú vælkomin at ringja til Gunnar Mohr, stjóra, á 501121 ella við telduposti: gmo@14.fo

Umsóknarfreistin er 8. november 2005.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til:

Sp/f 14
Stílað Gunnari Mohr
J.C. Svabosgøta 29
FO-100 Tórshavn

Sp/f 14 varð stovnað í 1936 og rak skipasmiðjuvirksemi til 2004. Fyritøkan virkar nú burturav sum íløgufelag. Eginognin tann 31.12.2004 var 288 milliónir krónur. Vit virka í einum altjóða umhvørvi og hava samband við íløgufeløg og peningastovnar kring alt Evropa.

**Sp/f 14**
J.C. Svabosgøta 29, FO-100 Tórshavn, www.14.fo